

*Janus á Húsagarði við einari av myndunum, sum hann hevur teknað til bókina – og sum verður við á sølframsýningini í Norðurlandahúsinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Fyrsta tónleika ævintýr á føroyskum

**BARNABÓK »Veiða vind« er stórfingin upprunaføroyskt tónleikaævintýr eftir Kára Bæk, Rakel Helmsdal og Janus á Húsagarði. Talan er um vakra myndabók og tónleikafløgu, har til ber at hoyra søguna**

**Eirikur Lindenskov**

Veiða Vind er eitt sera forkunnugt upprunaføroyskt tónleikaævintýr eftir Kára Bæk og Rakel Helmsdal. Janus á Húsagarði hevur myndprýtt, og úrslitið er ein farmúr vøkur myndabók við fløgu, har Føroya Symfoniorkestur spælir tónleikin og Annfinnur Heinesen lesur ævintýrið.

Veiða Vind er eitt tónleikaævintýr um trý systkin, tær fýra árstíðirnar, ein dreka, eina álvagentu og eina bjørn. Ævintýrið er eisini um hugflog og veruleika í einum skapandi meldri. Søgan byrja, meðan stóribeiggi liggur og lesur upp á kvæðið um Ólav Riddararós, sum skal út á heiðina at verða villini hind. Lítlibeiggi misskilir, men fær íblástur til at fara út av veiða vind. Systir hansara fer aftaná, og so fær hugflogið fríar ræsur...

Tónaskaldið fær íblástur frá kvæðalagnum og skapar eitt frálíkt tónleikaverk, sum uttan iva fer at hugtaka bæði børn og vaksin.

Talan er um stóra innbundna myndabók í litum, sum er 42 blaðsíður. Við bókini fylgir fløga, har Føroya Symfoniorkestur við Brenharði Wilkinson, sum orkesturleiðara spælir tónleikin.

Mánadagin 9. mai byrja barnakonsertirnar hjá Føroya Symfoniorkestri. Tríggjar konsertir verða hvønn dag, frá mánadegnum til hósdagin 12. mai. Her fáa øll børn í Føroyum frá 3 til 10 ár møguleikan at hoyra nýggja tónleikaverkið Veiða Vind, sum er skrivað til høvið. 3.500 børn úr øllum Føroyum hava longu teknað seg at koma í Norðurlandahúsið hesar dagarnar.

Føroya Symfoniorkestur framførir tónleikin, meðan Annfinnur Heinesen, sjónleikari, lesur søguna, samstundis sum vøkru myndirnar hjá Janusi verða vístar á stórskíggja aftan fyri orkestrið.

Umfram nýggja verkið Veiða Vind, verða eisini onnur viðkomandi tónleikaverk framførd, sum børnini kenna. Kenda lagið hjá Olsen Bandanum verður spælt, og børnini sleppa at syngja nakrar føroyskar barnasangir saman við Føroya Symfoniorkestri.

Barnakonsertirnar hjá Symfoniorkestrinum eru sera væl umtóktar. Aftur í ár eru barnakonsertirnar eitt samstarv millum Norðurlandahúsið, Føroya Syfoniorkestur, Nám og Bókadeild Føroya Lærarafelags, sum geva tónleikaverkið út í bók. Í 2009 framførdi Føroya Symfoniorkestur verkið Magnus Musikus, sum eisini kom út sum bók við fløgu.

Tórshavnar Býráð, Mentamálaráðið og onnur hava stuðlað og gjørt tað møguligt at hava barnakonsertir og geva verkið út í bók.



*Sera forkunnu tekningarnar hjá Janus á Húsagarði hóska sera væl til tekstin hjá Rakel Helmsdal*

## Sølu-framsýning

**Sunnudagin klokkan 15 letur upp søluframsýning í Norðurlandahúsinum við vøkru tekningunum hjá Janusi á Húsagarði, sum hann hevur teknað til tónleikaverkið »Veiða Vind«. Talan er um 19 tekningar. Í samband við at framsýningin letur upp, verður greitt frá um tónleikaverkið. Klokkan 16 verður høvi hjá teimum vitjandi at hoyra verkið til aðalroyndina hjá Føroya Symfoniorkestri.**